reportasjurøð | Lívið á Landssjúkrahúsinum

at mala fyri tær, eru boðini hann fær.

Og ein gamal vestmenningur, sum var áhaldsin og hevur brákað høgra herðablað, fær fatl og ávísing um 1 gramm av panodili og 600 milligramm av Brufeni sum pínulinna.

– Eg? Fjúrtan dagar í fatli? Ája, sigur gamli, sum hvørki tykist trúgva upp á fatl ella tablettir. Homøopatiskur fýrur.

Klokkan hálvgum eitt fræ̈ttist, at ein sjúkrabilur úr Klaksvík er komin til Skálafjarðar. Hann koyrir neyðsend við einum manni um seksti ára aldur. Sjúklingurin er Karsten Hansen, løgtingsmaður. Tvær narkosusjúkrasystrar eru við. Illgruni er um, at løgtingsmaðurin hevur heilabløðing. Fyrsta, sum Tórgerð fer at kanna, er, um tað ber til at fáa sjúklingin við Atlantsflogi klokkan 17.30.

Klokkan eitt er ýlandi sjúkrabilurin komin fram. Karsten liggur á síðuni. Hann hostar illa og goysir grøna spýggju úr sær. Tórgerð og medisinska forvaktin, John Karstensen, taka ímóti. Rullað verður skjótt innar á skaðastovu 1, og stutt eftir fer sjúklingurin við lyftu til skanningar.

Tórgerð rennur upp gjøgnum trappurnar og yvir móti CT-skannararúminum á aðru hædd. Tey sleppa ikki inn. Har er upptikið.

– Hann er fullkomiliga stabilur, staðfestir onnur narkosan.

– Hvussu er satureringin, spyr hin.

– Hundrað, svarar Tórgerð.

– Hevur tú kallað anastesiina?

– Ja, eg havi tosað við Theodor, svarar Tórgerð, sum tekur støðu til at fara niður aftur á skaðastovuna við sjúklinginum.

– Ha? Søgdu tit ikki tjúgu minuttir? Ókey. Vit hyggja líka at honum. Hann er á skaðastovuni nú, og so fara vit, sigur John við tey í skanningini. John klárar so dánt at halda sær, men tað sæst, hvat ið hann heldur um ógvuliga ógreiða samskiftið millum skaðastovuna og skannararúmið.

Maria kemur við iltfløsku og leggur panodildropp, meðan Tórgerð skrivar tey virðini, sum eru tøk; blóðtrýst, puls og iltinnihald. Allar tilgongdir sita í merginum á teimum báðum royndu sjúkrasystrunum.

– Hevur hann IV-atgongd, spyr Theodor Høgagarð róliga og leskar sær á ta blóðreyðu sagosúpanina við sviskum, sum hann hevur í einum glasi.

– Ja, svarar Tórgerð og ger Primperan og Zofran klárt at sproyta í sjúklingin fyri vaml.

– Tað er einki fyri meg akkurát nú. Vissi hann missir vitið, gevst at anda ella fær hjartasteðg, so komi eg á banan, sigur Theodor, sutlar tað seinasta av súpanini í seg og fer víðari í fullu skránni.

Hálvan tíma seinni er Karsten Hansen skannaður og vístur til gongina á B7. Haðan verður tingmaðurin nakað seinni fluttur á einastovu á B8, meðan manningin á G1 fer aftur í eldin.



*Høgni Djurhuus, yvirlækni. Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ann raknar við

Tað herjar rættiliga á hjá Ann, sum hevur tikið dupultvakt. Tað ræður um at vera árvakin í viðrakningini. Eitt bil liggur ein steriliserað kona har. Hon hevur heldur lágan puls.

– Hevur tú pínu? Vilt tú hava okkurt at drekka?

Konan svarar játtandi og fær bæði vatn og Voltaren.

Ein takksamur prostatasjúklingur fær eisini vætu. Hann hevur óvanliga lítið blóð í landinum. Skjótt er skitið verk; danski urologurin, sum er komin til landið at skera, sigst arbeiða sjáldsama seint. Men arbeiðið, hann ger, er snøgt sagt ólastandi.

Í løtum eru allar sjúkrasystrarnar samstundis á Brúnni, sum tær kalla rúmið við telduskíggjum og eygleiðingargluggum á intensivu deild. Fólk liggja í óviti rundan um tær, men teirra egna fakliga tilvit er øgiligt. Og evnið er altíð tað sama: Undirmanning, undirløn og samskifti undir alt mark. Serliga stendur á at tosa við fyrisitingina um lønar- og avspákingarspurningar.

Í dag samdust tær um at sýta fyri at taka eykavaktir. Men lyftið verður kanska torført at halda, tí Randi fer niður at lesa víðari. Og Hansina hevur júst sagt upp. Margit er deildarleiðari á G1. Hjá henni ræður nú um at finna rætta andlitsbráið. Tað kann vera ein avbjóðing í sjálvum sær. Hon fær 3.000 krónur eyka um mánaðin fyri eitt lív sum lús millum tvær negl.

– Vit mugu hava luft. Tí mugu vit fáa vikarar. Teir arbeiða ið hvussu er 40 tímar um vikuna, heldur hon fyri.

Allar vita, at vikararnir fáa einar 230 krónur fyri dagtíman. Ein fastlønt við hægsta embætisaldri fær 133 krónur fyri sama tíma. Randi og Vónbjørt tiga. Sóleyð sigur eitt sindur. Men hvíti hestahalin við tí ljósareyða lastikkinum sveiggjar skjótt, tá ið Ann grundgevur:

– Hví fáa vit ikki bara meiri í løn, heldur enn at Landssjúkrahúsið betalir einar 600 krónur um tíman fyri vikarar. Kanska skuldu vit bara melda okkum til onkra vikarstovu ...

Men so verður spontani fakfelagsfundurin slitin. Ann noyðist aftur í eldin, tá ið ein smádrongur ressast við í viðrakningini. Ann er skjót og avgjørd, tá ið hon tekur blóðuga tunguhaldaran úr munninum á dreinginum. Men tá ið hon hevur givið morfin triðju ferð, og drongurin framvegis gremur seg um pínu, fer mamman at tára. Monnum so líkt letst pápin floyta ljóðleyst. Hann krógvar kenslurnar, sæst við afturlatnum eyga.

– Vilt tú hava reyða saft, spyr Ann dreingin eitt sindur sperd.

Drongurin nikkar píndur og fjaroygdur, alt um somu leið. Ann dámar einki at síggja dreingin soleiðis. Hon kundi hugsað sær, at narkosulæknin var í nánd. Og endiliga kemur Høgni Djurhuus. Hann hyggur blídliga at dreinginum og vendir sær til foreldrini:

– Hatta sær gott út. Teir vóru næstan komnir niður allíkavæl, steinarnir. Teir vóru í punginum. Men læknin hevur so fest teir niður við einum tráði, so teir ikki fara uppaftur. Jú, hatta er sárt. Ja, sárt er tað! Hon gevur meiri pínustillandi. Tit mugu hava góða eydnu við honum. Havið tað gott ...

Og so setur Høgni seg niður á ein stól. Bogin og grønur sum ein óbúnað banan. Hann er nøgdur, men lúgvaður á líta.

Eisini narkosulæknar kunnu vera troyttir.

## Næstu ferð

Nú er klokkan ordiligt 10.02. Mamma stendur úti í longu gongini og bíðar eftir verkjum. Har renna gongsgentur, og har standa summar konur uppsteðgaðar, tí gongulagið er í ólagi. Ein hurð er neyðútgongd. Man mær tørva eina slíka í dag? Á bróstunum hongur nógv danskt um bróst, bilbelti og annað spennandi. Fólkini í hvítum klæðum eru ikki líka glað, sum tey hava verið. Her er stilt eftir stríð. Men konan Samson mannar seg upp.

**Í triðju greinini í røðini um Lívið á Landssjúkrahúsinum vitjar Høgni Mohr á Føðideildini. Les reportasjuna í næsta Vikuskifti.**

Sosialurin